# Vil hava Surtsey

Vestmannaoyingar vilja hava størri ræðisrætt yvir grannaoynni Surtsey. Tey vísa á, at oyggin, sum kom undan kavi í einum gosi á havbotninum, eru jarðfrøðiliga partur av Vestmannaoyggjunum. Higartil hevur umhvørvismálaráðið í Reykjavík havt umsjón við oynni, og ST hevur eisini lýst hana sum serstakt náttúruøki. Býráðið í Vestmannaoyggjunum hevur samntykt at biðja myndugleikiarnar flyta umsjónina úr Reykjavík út í Oyggjarnar, men enn er tað ikki gjørt.



*Vestmannaoyingar vilja hava Surtsey*
*Mynd: Vísir)*



*51 ár eru síðani teir 60 gomlu skúlafelagarnir skiltust her á trappuni í Nunnuskúlanum*



*Tað tók sína tíð at fáa gomlu næmingarnar á Nunnuskúlanum at sita stillar á trappuni*



*Tær báðar gomlu skúlavinkonurnar, Ása Justinussen og Annika Hoydal, høvdu nógv at tosa um, nú tær vóru 'í skúla' aftur*

# Næmingar hittust eftir 51 ár

**Leygardagin sessasust 60 fyrrverandi skúlafelagar til myndatøku á trappuni í Nunnuskúlanum, har tey skiltust fyri 51 árum síðani**

SKÚLAFELAGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eftir fleiri royndir eydnaðist tað umsíðir leygardagin at savna heilar 60 av næmingunum, sum gingu á Nunnuskúlanum frá 1952 til 1957.

## Sum í gomlum skúladøgum

Tað var sum í gomlum døgum, tá 85 ára gamla nunnan leygardagin mátti ringja fleiri ferðir við messingaklokkuni, fyri at fáa sínar gomlu næmingar at sita stillar á trappuni í Nunnuskúlanum.

Við krossfiskum á høvdinum komu dreinginir umsíðir uppá pláss aftast, meðan genturnar við sloyfum í hárinum sluppu at sita fremst. Og so var klárt til myndatøku.

Heili 51 ár vóru liðin síðani hesir næmingarnir spjaddust í ymsar ættir, eftir at hava gingið í nunnuskúlanum saman í fimm ár.

Hesi árini gingu 122 næmingar í nunnuskúlanum í longri ella styttri tíðarskeið. 22 av teimum eru ikki á lívi longur, men leygardagin eydnaðist so at savna heili 60 aftur.

Lagið var avbera gott, tá gomlu skúlafelagarnir fóru inn um stóru, reyðu hurðina at hyggja at sínum gamla skúla saman við eini av nunnunum, tey høvdu sum lærara.

Nógv var sum vera man at tosa um hjá gomlu skúlafelagunum, sum hugnaðu sær óført saman og endaðu dagin við eini stórari næmingaveitslu leygarkvøldið.